tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 19.02.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss

Ikki møtt: Eyð Eidesgaard

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 2/24 | 24/00028-5 | P/F Varðin Pelagic -Almenn hoyring, samb. §29 stk 4 í byggisamtyktini, við atliti til hægri bygging í sambandi við bygging av protein og lýsiverksmiði á Tvøroyri |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Eyð Eidesgaard hevur fráboða forfall til fundin.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkalla Jens Arna Leo Hammerfoss, ið er næst (2) valdi tiltakslimurin á lista “C” Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin.

Kristin Michelsen boðar frá, at Jens Arna Leo Hammerfoss hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen lesur skránna til eykabýráðsfundin í dag 19. februar  2024 og spyr um viðmerkingar eru til hesa. -ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 2/24
## 24/00028-5 P/F Varðin Pelagic -Almenn hoyring, samb. §29 stk 4 í byggisamtyktini, við atliti til hægri bygging í sambandi við bygging av protein og lýsiverksmiði á Tvøroyri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 19.02.2024 | 15/24 |
| 2 Tekniska nevnd | 19.02.2024 | 13/24 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 19.02.2024 | 18/24 |
| 4 Býráðið | 19.02.2024 | 2/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 23. Jan. 2023**
Innkomin eru tvey "3" broytingaruppskot, sum eftirfylgjandi er viðgjørdar av teknisku deild.

Innkomin uppskot:
- A: Petur Hammer
- B: Neysta eigarar
- C: Livilig Kor

**Viðmerking hjá umsitingini:**
Til viðgerðar, er broytingaruppskot, ið eru latin Tvøroyrar kommunu, eftir at Tvøroyrar býráð hin 30. Des. 2023, samtykti einmælt, at lata P/F Varðin Pelagic byggiloyvi til protein- & lýsuverksmiðju, samb. galdandi byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu, §29, stk. 4. "bygging á havnaøkið D", við áseting:
- *Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.*

Umsitingin metur, at øll trý innkomin hoyringar uppskotini eru yvirskipað uppskot/viðmerking til broyting av allari verkætlanini, heldur enn talan um broytingaruppskot til aktuellu hoyring um bygging av "*Goymslubrunnum á í mesta lagi 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi 60 m høgir"*.

Tekniska deild metur ikki, at nakað av innkomnu hoyrings uppskotinnum, hava beinleiðis viðmerkingar ella broytinguppskot til fyriliggjandi ætlan at byggja "*Goymslubrunnar á í mesta lagi 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi 60 m høgir"*

**<u>Niðurstøða hjá Teknisku deild:</u>**

**Galdandi fyri hoyringaruppskot A&B.**
Talan er um ætlan, ið ikki er samsvarandi umsóknini um byggiloyvið frá P/F Varðin Pelagic, og er ikki heimild í galdandi byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu, §29, stk. 4. "bygging á havnaøkið D"

Ynskir býráði, at broyta verkætlanina, sum P/F Varðin Pelagic hevur søkt byggiloyvið til, samsvarandi uppskoti A&B, er neyðugt at byrja tilgongd at broyta galdandi byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu, §29, stk. 4. "bygging á

havnaøkið D", har neyðugt verður at fremja nýggjar árinskanningar, og útvega umhvørviskanning samsvarandi hesum.

**Galdandi fyri hoyringarsvar/ viðmerking C:**
*Áhugafelagið Livilig Kor á Tvøroyri skriva i hoyringarsvari C at: "Bólkurin Livilig kor boðar við hesum, enn einaferð, Tvøroyrar kommunu frá, at vit staðiliga mótmæla, at umsóknin hjá Varðanum Pelagic um byggiloyvi til protein- & lýsuverksmiðju á ætlaða økinum eystan fyri verandi virkið hjá Varðanum Pelagic verður gingin á møti"*

1. *Vit mótmæla og átala almennu hoyringina hjá Tvøroyrar kommunu, lýst tann 4. Januar 2024, sum er uttan lógarheimild.*
2. *Vit mótmæla og átala, at Tvøroyrar býráð hevur samtykt eitt óheimilað "proforma" byggiloyvi á býráðsfundi tann 30. Desembur 2023.*
3. *Vit mótmæla og átala, at partshoyringar smb. Fyrisitingarlógini §18 (vísandi til skriv sent Tvøroyrar kommunu 25. Juli 2023) ikki hava verið.*

**Viðv. punkt 1&2**, er umsitingin av tí fatan, at hoyringar svar "C" frá bólkinum Livilig kor ikki beinleiðis umrøður og viðgerð aktuellu hoyring um bygging av *"Goymslubrunnum á í mesta lagi 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi 60 m høgir"*.

Viðmerkingarnar í uppskot C eru meira yvirskipaða mótmælir til ætlaðu bygging av protein og lýsuverksmiðju á havnarlagnum á Tvøroyri.

Tekniska deild metur, at málið um broyting av byggisamtykt fyri havnarlagið á Tvøroyri og ætlaðu bygging av protein og lýsuverksmiðju er væl og virðiliga lýst, og viðgjørd fult í trá við galdandi lógir á økinum.

**Viðvíkjandi punkt 3,** er umsitingin av tí fatan, at almenn hoyring hevur verði um ætlaðu byggi verkætlanina hjá P/F Varðin Pelagic á borgara fundi í SALT hin 24. Jan. 2023, og eisini hevur almenn hoyring verði um broytingina av byggisamtyktina fyri havnarøkið D á Tvøroyri, har almenna framløgan var á býráðsskrivstovuni á Tvøroyri frá 5. – 19. Januar 2024.

Eftirfylgjandi hevur Tvøroyrar kommuna fingið góðkenningarskriv frá Umhvørvismálaráðnum hin 10. Juli, sum góðkennir broytingina uttan viðmerkingar.

Hoyringar, ið enn ikki eru avgreiddar sum eru ávegis, eru almenn hoyring av árins- og umhvørviskanningum, ið Umhvørvisstovan skipar fyri, áðrenn Umhvørvisstovan kann útskriva evt. Umhvørvisgóðkenning til verkætlanini hjá P/F Varðin Pelagic. Partshoyring, ið Tvøroyrar kommuna skipar fyri, áðrenn møguligt og endaligt byggiloyvið kann latast til P/F Varðin Pelagic at byggja protein og lýsuverksmiðju á havnarøkinum D á Tvøroyri, sum felagið søkti um hin 29. Desember 2023.

**Tekniska deild mælir býráðnum at taka støðu til:**

1. Umsitingin skal byrja tilgongd at broyta byggisamtyktina, samsvarandi uppskoti A&B.
2. Broytingar uppskotið hjá teknisku deild, ið liggur innan fyri verandi byggisamtykt, har partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt.

**Lógargrundarlag:** Almenn byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- & havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 19. februar 2024:**
Bjarni Hammer tekur undir við broytingar uppskotinum hjá teknisku deild, ið liggur innan fyri verandi byggisamtykt, har partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt, tó við tilmæli um, at landnyrðingshorninum á bryggjuni og bygninginum verður avrundað.
Kristina Roest og Anita Vibergsdóttir taka støða á býráðsfundinum.

**Tekniska nevnd 19. februar 2024:**
Alvi Mortensen form. í teknisku nevnd tekur undir við broytingar uppskotinum hjá teknisku deild, ið liggur innan fyri verandi byggisamtykt, har partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt.
Kristina Roest og Anita Vibergsdóttir taka støða á býráðsfundinum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. februar 2024:**
Alvi Mortensen tekur undir við broytingar uppskotinum hjá teknisku deild, ið liggur innan fyri verandi byggisamtykt, har partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt.
Bjarni Hammer tekur undir við broytingar uppskotinum hjá teknisku deild, ið liggur innan fyri verandi byggisamtykt, har partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt, tó við tilmæli um, at landnyrðingshorninum á bryggjuni og bygninginum verður avrundað.
Kristina Roest forkv. í Trivnaðar- og umhvørvisnevndin tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið 19. februar 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við niðurstøðuni hjá umsitingini viðv. uppskotinum/viðmerking «C» frá Livilig kor. **-Einmælt samtykt**

Borgarstjórin mælir til at kommunan skipar fyri parts hoyring, áðrenn býráði endaliga viðgerð byggiloyvið frá P/F Varðin Pelagic. **-Einmælt samtykt.**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at atkvøðu um uppskot A frá Petur Hammer, ið krevur broyting av galdandi byggisamtykt fyri havnarøkið D. **-Einmælt samtykt ikki at taka undir við uppskot «A» frá Petur Hammer.**

Borgarstjórin mælir býráðnum til at atkvøðu um broytingaruppskotið hjá teknisku deild, ið liggur innan fyri verandi byggisamtykt, har partur av fjøruni verður varðveittur, soleiðis at neystaeigarar framhaldandi fáa atkomu til fjøruna og kunna brúka teirra bátadrátt.
**-Einmælt samtykt at taka undir við broytingaruppskotinum hjá teknisku deild.**

Fundurin lokin kl. 18:40

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

~~Eyð Jóna Eidesgaard~~
Jens Arna Leo Hammerfoss